# Vágbingar vilja bara hava uttan at lata nakað afturfyri

**– Dettur ætlanin um skúladepil í Hovi niðurfyri, fer landsstýrið ikki at tosa við Vágs Býráð um eitt røktarheim, sigur Hans Pauli Strøm**

SKÚLADEPIL OG RØKTARHEIM

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*




*Hans Pauli Strøm tekur avgerðina hjá Vágs Býráði til eftirtektar. Hetta var eitt tilboð til allar suðuroy, so hóast allar kommunurnar tóku undir við tí, uttan Vágur, haldi eg, at tilboðið má metast at vera burturdottið, sigur Hans Pauli Strøm. Stór kravgonga var í býráðnum, tá ið ætlanin var til viðgerðar*

Landsstýrið hevur fingið nakað at hugsa um, nú Vágs Býráð heldur fast um at miðnámsskúlin skal byggjast í Vági.

Uttan at hava tosað við landsstýrið, metir Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almannamálum, at ætlanin un skúladepil í Hovi og røktarheim í Vági er nú dottin burtur.

– Talan var um eitt samlað tilboð til suðuroyingar. Taka kommunurnar ikki undir við tí, meti eg, at tilboðið dettur burtur, sigur landsstýrismaðurin.

Hann sigur eisini, at av tí at talan var um eitt samlað tilboð, kunnu vágbingar ikki bara taka tað burturúr, sum hóvar teimum best og nokta at tosa um tað, sum ikki hóvar teimum.

Tí heldur hann ikki, at landsstýrið bara kann fara á fund við Vágs Býráð um røktarheim í Suðuroy, sum býráðið annars legði upp til á býráðsfundinum týskvøldið.

– Tað er óviðkomandi at Vágs Býráð pilkar ein part burturúr heildini og vil tosa við landsstýrið um eitt røktarheim, tí talan er ikki um eitt røktarheim fyri Vág, men fyri alla Suðuroy.

– Hetta var eitt tilboð um at byggja eitt stórt røktarheim í Suðuroy og at byggja tað í Vági, tí vit halda, at har halda vit at tað ger størst gagn, sum støðan er. Somuleiðis skuldi hetta røktarheimið raðfestast frammanfyri øll onnur røktarheim. Hetta var samstundis eitt tilboð frá øllum landsstýrinum og allari samgonguni.

Hans Pauli Strøm sigur, at nú er støðan tann, sum hon var frammanundan, har landsstýrið fer at viðgera eina umsókn frá Vágs Býráð um at byggja upp í eldrasambýlið í Vági.

Men tað er eitt mál, har Vágs Kommuna einsamøll skal betala 90% av rakstrinum. Hinvegin skal kommunan ikki betala eitt oyra av rakstrinum av einum røktarheimi.

Kortini leggur Hans Pauli Strøm dent, at hann fer fegin at tosa við Vágs Býráð um at byggja sambýlið út og um onnur mál, sum býráðið hevur á skránni.

– Men sum eg síggi tað, er hetta tilboðið um eina samlaða ætlan fyri alla oynna við skúladepili og røktarheimi, burturdottin og Vágs Býráð kann ikki væntað at tað ber til at taka ein part burturúr heildini og fremja tað, sum passar býráðnum best og lata tað fella, sum ikki hóvar kommununi.

Hans Pauli leggur seg heldur ikki út í hvussu stórur ella lítil meirilutin í Vági er.

– Ein meiriluti er ein meiriluti, soleiðis er fólkaræðið og fyribils er mín støða tann, at vit kunnu ikki seta eina loysn í verk í Suðuroy, sum kommunurnar ikki taka undir við, tí vit kunnu ikki tvinga Vágs Kommunu til nakað.

Hann sigur kortini, at landsstýrið fer nú at tosa saman um støðuna.

# Tveir býráðslimir manglaðu í

**Skal tað skerast heilt út í papp, vóru tað tveir býráðslimir í Vági, sum torpederaðu ætlanina hjá landsstýrinum at byggja skúladepil í Hovi og røktarheim í Vági**

SKÚLADEPIL OG RØKTARHEIM

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Soleiðis er fólkaræðið: Ein meiriluti er ein meiriluti, hvussu lítil hann so er og í Vági vóru tað tveir býráðslimir, sum gjørdu munin. Støðan hjá hesum báðum hevur avgerðandi týdning fyri ætlanin at byggja skúladepil í Hovi og røktarheim í Vági: Býráðssalurin var fullur av mótmælisfólki, tá ið málið var til viðgerðar týskvøldið*

Nú er ivingarsamt, hvørja lagnu ætlanin hjá landsstýrinum um at byggja ein skúladepil í Hovi og røktarheim í Vági, fær.

Landsstýrið vildi hava kommunurnar at siga sína hugsan um málið, áðrenn farið var víðari.

landsstýrið vildi hava at vita, um kommunurnar í Suðuroy tóku undir við ætlanini so at greiða fekst á um hetta er nakað hjá landsstýrinum at arbeiða víðari við.

Upprunaliga hevur verið ætlanin at byggja heilsuskúla á Tvøroyri og miðnámsskúla í Vági. Men fyri at rationaliserað bygginina og raksturin, hevur landsstýrið skotið upp at byggja báðar skúlarnar í ein depil í Hovi. Fyri at grundstykkið, sum er grivið út fyri skúlanum í Vági, ikki skal fara fyri skeyti, skjýtur landsstýrið upp at byggja røktarheim á stykkinum ístaðin.

Umframt at gera bygging og rakstur bíligari upp á seg, heldur landsstýrið at ein skúladepil í Hovi kundi verið við til a samansjóða oynna. Samstundis er stórt trot á røktarheimi og somuleiðis kundi hetta skapt nógv arbeiði í byggivinnuni. Hetta hevði eisini skapt nógv almenn arbeiðspláss í Suðuroy, serliga konufólkastørv, sum serliga stórt trot er á.

Nú hava so allar kommunurnar svarað landsstýrinum.

Av teimum sjey kommununum í oynni, eru tær seks til reiðar at tosa við landsstýrið um ætlanina.

Men ætlanin fekk eitt skot fyri bógvin, tá ið málið var til viðgerðar í Vágs Býráði týskvøldið, tí har samtykti ein meiriluti uppá seks av teimum níggju býráðslimunum, at halda fast um upprunaligu ætlanina at byggja skúlan í Vági. Vágbingar vilja tó fegnir tosa við við landsstýrið um at byggja røktarheim í Suðuroy.

Tað merkir, at talan var um ein meiriluta uppá tveir býráðslimir, sum feldu uppskotið um at tosa við landsstýrið.

Her skal tó skoytast uppí at í Sumba var tann eini bygdaráðslimurin eisini fyri at halda fast um upprunaligu ætlanina at byggja skúlan í Vági, men hinir fýra vóru fyri at tosa við landsstýrið.

Í Suðuroy eru tilsamans 43 bý- og bygdaráðslimir og av teimum eru tað so tveir býráðslimir í Vági, sum hava havt avgerðandi orðið at siga- í hvussu so er fyribils, tí nú er spurningurin, hvørja støðu, Landsstýrið kemur til.

Men soleiðis er fólkaræðið. Býráðið umboðar Vágs Kommunu og ein meiriluti er ein meiriluti, hvussu lítil hann so er…

## Løgið at Vágs Býráð ikki vil tosa við okkum

**Jóannes Eidesgaard, løgmaður, undrast á at Vágs Býráð ikki so mikið sum vil tosa við Landsstýrið um ætlanin at byggja røktarheim í Vági og skúladepil í Hovi**

SKÚLADEPIL OG RØKTARHEIM

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tá ið vit ikki so frægt kunnu tosa saman, ber eisini illa til at samstarva saman.

– Jóannes Eidesgard, løgmaður undrast á, at Vágs Býráð ikki so frægt sum vil tosa við landsstýrið um ætlanina at byggja skúladepil í Hovi og røktheim í Vági.

Men hann ásannar, at hetta er so støðan hjá Vágs Býráði og tað landsstýrið so bara taka til eftirtektar.

Hann sigur, at landsstýrið mán ú taka málið til viðgerðar og taka støðu til, hvørja støðu tað skal taka.

Hann sigur, at landsstýrið hevur biðið um svar frá kommununum í Suðuroy og av teimum sjey kommununum, hava seks kommunur játtað at tosa við landsstýrið og tað skal eisini havast í huga.

Verður øll oyggin tikin undir einum, er stórur meiriluti fyri at tosa við landsstýrið og støða skal nú takast til, hvat skal henda, hóast ein lítil partur av oynni hevur eina aðra støðu. Landsstýrið má sjálvandi taka støðu til um ein lítil partur av var negativur ímóti ætlanini.

Løgmaður vísur eisini á, at serfrøðingar vísa á, eisini á ráðstevnuni í Øravík týsdagin, at tað sum størstur tørvur er á í Suðuroy, er konufólkastørv. Og er tað nakað, sum eitt røktarheim er, so er tað eitt arbeiðspláss til konufólk, sigur løgmaður.